# Tinganesisk formalisma

**Kári á Rógvi, løgfrøðingur og formaður í Javnstøðunevndini, er í øðini um, at Lisbeth L. Petersen er koyrd frá sum forkvinna í nevndini, sum skal arbeiða fyri øktum kvinnuleikluti í politikki.**
**– Hatta er ein óneyðug og formalistisk avgerð. Um hon skal frá, skulu løgtingslimir heldur ikki vera í Grundlógarnevndini, sigur hann**



*Rigmor Dam*
rigmor@sosialurin.fo

Í mong ár hevur grand old lady í føroyskum politikki, Lisbeth L. Petersen, arbeitt við javnstøðumálum, og seinasta bragd hennara var at gerast forkvinna í nýstovnaðu nevndini, sum skal virka fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.

Sambært henni sjálvari var hetta ein góður møguleiki veruliga at gera nakað á økinum, ikki minst í samstarvi við Javnstøðunevndina, hinar politisku flokkarnar og Útnorðurráðið.

Men nú er Lisbeth ikki forkvinna í nevndini longur, tí í skrivi frá løgmansskrivstovuni til tey bæði løgtingsumboðini, Lisbeth L. Petersen og John Johannesen, verða tey kunnað um, at tey ikki longur eru ávikavist forkvinna og limur í nevndini.

Grundgevingin fyri uppsøgnini er at finna í grein 8 í stýrisskipanarlógini, har løgtingslimir verða forðaðir at sita í nevndum, ið politiska skipanin sjálv hevur eftirlit við.

„§ 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.”

Soleiðis stendur at lesa í stýrisskipanarlógini, og skuldi hendan ásetingin stýrisskipanarlógini forða fyri, at løgtingið far útinnandi vald.

Lisbeth sigur við Sosialin, at hon er ómetaliga vónbrotin av at vera koyrd úr nevndini, og hon skilur als ikki, hví hetta hendir júst nú. Samstundis undrast hon á, at løgmansskrivstovan metir nevndina vera eina nevnd, sum hevur útinnandi vald, tí uppgávan hjá henni er bert at kunna og kanna, og at geva eitt tilmæli um tvey ár.

### Ivasom avgerð

Kári á Rógvu, løgfrøðingur og nýliga settur formaður í Javnstøðunevndini, er ikki sørt skakaður av hendingini. Hann hevur samstarvað nógv við forkvinnuna í nevndini, og hevur mangan verið sera hvassorðaður, tá embætisfólk og reglutrælir lesa lógargreinir fram um vit og skil, og ikki minst politiska viljan.

Hann sigur, at tulkingin hjá løgmansskrivstovuni av grein 8 er skeiv, av tí, at í hesum føri er talan um lógarfyrireiking og aðra fyrireiking – ikki umsitingar ella avgerðarheimildir.

– Verður tulkingin hjá løgmansskrivstovuni standandi, so verður helst neyðugt hjá tingfólki at taka seg úr aftur stjórnarskipanarnevndini (grundlógarnevndini), sigur hann, samstundis sum hann langar út eftir løgmansskrivstovuni.

– Løgmansskrivstovan hevur, uttan nakað ítøkiligt høvi ella áhugamál, og á sera formalistiskum og løgfrøðiliga ivasomum grundarlagi, koyrt Lisbeth L. Petersen frá sum forkvinnu í nevndini, sum skal arbeiða fyri øktum kvinnuleikluti í politikki.

### Neyðug lógarmýking

– Tað er júst við at mýkja lógirnar í tulking, at vit gera framstig. Vóru embætisfólk líka formalistisk í 1948, so hevði Petur Mohr Dam fingið at vita, at heimastýrislógin var í stríð við grein 3 í grundlógini, sum ásetur, at lóggávuvaldið er hjá fólkatinginum, sigur løgfrøðingurin, og greiðir frá sínari tulking av grein 8 í stýrisskipanarlógini:

– Grein 8 er partur av hysteriska tvassinum, sum varð tvangsfóðrað niður í tingfólk, tá eldra stýrisskipanarlógin gjørdist syndabukkur fyri politisk mistøk. Løgtingið hevur, í samband við nevndina um kvinnuluttøku, valt at tulkað hana soleiðis, at prinsippið í § 5 um, at løgtingið verður valt at umboða fólkið og fáast við almennar spurningar og lógarfyrireiking, skal vinna á § 8. Tí skulu tingfólk sjálvsagt taka lut í at gera tann tiltrongda eftirfylgjaran av stýrisskipanarlógina og í arbeiðinum at fáa fleiri kvinnur uppí politikk, sigur Kári á Rógvi. Og hann metir samstundis, at tað sjálvsagt rætt at fáa tingnevndirnar burtur úr fyrisitingini, soleiðis at tingfólk kunnu fáast við tað prinsippiella og almenna.

– Men nú verður § 8 brúkt at fáa tingfólk burturúr júst tí prinsippiella og almenna.

### Stovna felag

Og Kári á Rógvi undrast á, at hvørki embætisfólk, tingfólk, løgmansskrivstovan ella onnur varnaðust, at nakað skuldi verið galið, tá uppskotið til samtyktar um at seta nevndina varð fyrireikað, viðgjørt, samtykt, kunngjørt og Lisbeth sett sum forkvinna.

– Sambært tulkingini hjá løgmansskrivstovuni kundu vit stovnað eitt felag við heitinum: “Felagið fyri øktum kvinnuleikluti í politikki”. So kundi Lisbeth verið forkvinna, og landið latið nevndini 150.000 í stuðli. Men nú bleiv arbeiðið lagt í nevnd, sum varð stovnað við samtykt á Føroya Løgtingi. Hetta enntá eftir tilmæli frá Útnoðurráðnum, tí í øllum øðrum norðanlondum eru tað tey fólkavaldu, sum natúrliga eru við í slíkum arbeiði, sigur Kári á Rógvi við Sosialin.

Og hann metir ongan viðkomandi mun vera á stjórnarskipanarnevndini, tí har er eisini talan um, at landsstýrismaðurin “hevur ábyrgd av,” at tingfólk sita, hóast ásetingin í § 8 stýrisskipanarlógini kann lesast sum absolutt forboð móti, at tingfólk eru við í almennum nevndum, sum landsstýrið varðar av.

### Lisbeth best skikkað

Kári á Rógvu og Lisbeth L. Petersen hava samstarvað nógv seinastu tíðina, eftir at javnstøðumál vórðu flutt frá Almanna- & Heilsumálaráðnum út í Vinnumálaráðið, og ætlanir vóru um at báðar nevndirnar skuldu hava felags skrivstovu og skrivara. Millum annað tí kennir Kári á Rógvi tað serliga svárt og meiningsleyst, at Lisbeth L. Petersen nú er koyrd frá. Og hann skírir tað eitt rættiligt slag á nevið hjá samgongufeløgum løgmans, Lisbeth L. Petersen og ikki minst Hans Paula Strøm, sum hevði valt Lisbeth at standa fyri kanningunum og frágreiðingararbeiðinum hjá nevndini.

– Tað lá í kortunum beinanvegin, at Lisbeth var tann upplagdi leiðarin í arbeiðnum, um flokkur hennara valdi hana. Hon er fyrrverandi borgmeistari, floksleiðari, fólkatingslimur og løgmansevni, og er tann kvinnan, ið komin er longst í politikki í Føroyum, sigur Kári á Rógvi, og hann heldur fram:

– Tað er heilt ófatiligt, at løgmansskrivstovan skal leggja seg út í hetta, og forða tí mest sjálvsagda og best skikkaða persóninum at standa á odda fyri hesum arbeiðið. Javnstøðunevndin hevur havt sera gott samstarv við hesa nevndina, og vóru vit júst farin undir at seta skrivara til nevndirnar báðar og leggja nevndararbeiðið til rættis. Nú fáa báðar nevndirnar eitt stórt afturstig, sigur Kári á Rógvi.

– Har sum løgmansskrivstovan fer skeiv, er, at hon handlar uttan heimild ella áhugamál og uttan at lata Lisbeth ella okkum onnur fáa høvi at siga, hvat vit halda um spurningin. Um so er, at løgmaður vil brúka sína heimild at hava eftirlit við landsstýrismonnum, so eigur hann í øllum førum at lata tey við áhuga í málinum verða hoyrd og søkja sær umboðan, áðrenn avgerðin verður tikin, greiðir hann frá.

### Harmar landsstýrismann

Tað var Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og heilsumálum, sum á sinnið setti fram uppskot til samtyktar um at seta nevnd at arbeiða fyri øktari kvinnuligari luttøku í politikki. Hann er sera harmur um støðuna, sum er íkomin, men sigur seg kortini taka avgerðina hjá løgmanni til eftirtektar, um nakað er farið skeivt fram.

Hans Pauli Strøm sigur, at endamálið við at seta tinglimir í nevndina júst var, at flokkarnir skuldu fáa gagn av arbeiðinum og soleiðis samantvinna tað við flokspolitiska arbeiðið.

– Vón mín var, at samansetingin við løgtingslimum og fólki uttan fyri løgtingið fór at seta gongd á at fáa fleiri kvinnur upp í politikk, sigur landsstýrismaðurin. Og hann harmast um, at Lisbeth L. Petersen ikki longur sleppur at vera við í nevndini, sum hon hevur tikið stig til og virkað fyri í mong ár, eitt nú í samband við útnorðurráðið.

– Eg haldi ikki at Lisbeth L. Petersen hevur uppiborið at vera kveistrað til viks nú. Hon hevur nú í mong ár arbeitt við hesum málinum og hetta kann fyri víst rópast hjartabarn hennara, sigur landsstýrismaðurin.

### Løgin uppsøgn

Hitt løgtingsumboðið í nevndini er John Johannesen úr Javnaðarflokkinum. Hann sigur seg eisini harmast, at arbeiðið, ið júst skuldi byrja, nú dettur niðurfyri, og at hann hevði sæð fram til at fara undir arbeiðið. So hóast hann ímyndar sær, at tey, sum ikki eru í løgtinginum, eins væl kunnu gera arbeiðið, metir hann tað vera eitt bakkast fyri nevndina og samskiftið hennara við flokkarnar, at eingin parlamentarikari er við.

– Ikki minst haldi eg tað vera spell, at Lisbeth L. Petersen, sum í so mong ár hevur verið íðin á økinum, verður koyrd úr nevndini, sigur hann.

Annað, sum undrar John Johannesen er brævið, sum hann fekk sendandi hendan dagin. Hann sigur,

– Eg havi ongantíð sæð eina løgnari uppsøgn. Brævið, sum varð sent mær, var eitt bræv frá løgmanni til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum. Í brævinum verður víst á eitt ótal av lógum og lógargreinum, sum skulu undirbyggja, at løgtingslimir ikki kunnu manna nevndina fyri øktum kvinnuligari luttøku í politikki, sigur John Johannesen, meðan hann setir avgerðina í samband við orðið embætisveldi.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá løgmansskrivstovuni, men embætisfólkið vildi ikki endurgevast, og løgmaður sat á fundi. So tað verður eina aðra ferð.

**FAKTA**

**Limir í nevndini**

Lisbeth L. Petersen, forkvinna,
John Johannessen
Inga Dahl
Annleyg Lamhauge
Sólfríð Fjallsbak
Hjørdis Háberg Petersen
Kári á Rógvi
Bergtóra Hanusardóttir
Eyðun Christiansen
Steinbjørn Jacobsen

**FAKTA**

**Úr viðmerkingunum til samtyktina**

Nevndin skal til ársskiftið 2007/2008 arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir. Nevndin arbeiðir støðugt við at fremja arbeiðssetningin, meðan hon er sett. Arbeiðið eigur at fevna um tiltøk, sum kunnu gera fólk varug við týdningin av, at fleiri kvinnur verða umboðaðar, har politiskar avgerðir verða tiknar. Virksemið kann vera upplýsing, lýsingarátøk, undirvísing og útgáva av ymsum kunnandi tilfari.
Løgtingsvalið, sum eftir ætlan verður í januar 2008, verður eitt gott høvi at máta úrslitið av arbeiðinum hjá nevndini.

**FAKTA**

**Nevndin viðvíkjandi øktum kvinnuleikluti í politikki**

**Arbeiðssetningur**
Nevndin skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum, so talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum økist, og umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondunum.
Um ársskiftið 2007/2008 handar nevndin landsstýrismanninum frágreiðing um virksemi sítt og tilmæli um, hvussu framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri at fremja javnstøðu, har politiskar avgerðir verða tiknar.